## MIKLAGARÐUR SØKIR EFTIR FÓLKI AT SITA VIÐ KASSAN

**LEYST AT SØKJA ER:**

- Hálvtíðarstarv frá 1. juni 2005
- Hálvtíðarstarv frá 1. juli 2005
- Harumframt verður søkt eftir m/k til leygardagsvaktir og sum frítíðaravloysarar í juli og august 2005

Er hetta nakað fyri teg, so ring 31 30 11 og spyr eftir Johnny ella kom inn í Miklagarð og fá eitt prát.



MIKLAGARÐUR


# Arbeiðskvinnur í 70 ár

Komandi ár verður Havnar Arbeiðskvinnufelag 70 ár. Hetta skal sjálvandi markerast, og longu nú eru eisini onkur tiltøk fyriskipað.

Eitt nú fer felagið at hava eina framsýning í Smiðjuni í Lítluvík í døgunum 2. til 8. mars. Felagið heitir í hesum sambandi á fólk, sum hava eitt nú mydnir, avísklipp ella arbeiðsklæði, sum lýsa hetta tíðarskeiðið, um at læna sær hesi. Fólk verða biðin um at seta seg í samband við Havnar Arbeiðskvinnufelag á tlf. 353993 ella 317796.

**-jm**

# Kvívíkskórið konsert í Kvívíkar Skúla sunnudagin

Fram móti seinastu jólum vórðu stig tikin til at savna fólk í Kvívík til kórsang aftur í kirkjuni um jólini. Úrslitið var so hugaligt, at hildið varð fram við hesum kórarbeiði eftir nýggjár, og síðan hevur kórið tvær ferðir verið alment frammi: í sambandi við skúlavígslu í Kvívík grækarismessudag og á kórstevnuni á Eysturskúlanum í Havn 9. apríl.

Og nú sunnudagin kl. 17.00 býður kórið til egna konsert í Kvívíkar Skúla. Á skránni eru føroyskir upprunasangir og sangir í føroyskari týðing - teir flestu vár- og summarsangir -; men eisini verður sungið á øðrum tungumálum. Kórleiðari er Ólavur Hátún.


# Málsviðgerar til ALS

## Arbeiðsloysisskipanin sóknast eftir tveimum málsviðgerum

### Málsviðgeri til Tryggingardeildina

**Um Tryggingardeildina**
Tryggingardeildin umsitur vanligan arbeiðsloysisstuðul, fiskavirkisskipanina, arbeiðsloysistrygging fyri sjálvstøðug vinnurekandi, farloyvisskipanina og Barsilsskipanina.

Á Tryggingardeildini starvast 7 fólk.

**Uppgávur**
Uppgávurnar hjá málsviðgeranum verða:
- at taka sær av málsviðgerð í sambandi við tær uppgávur, ið deildin umsitur
- samrøður og samskifti annars við viðskiftafólk okkara
- at verða við til at tillaga og menna tænasturnar

**Førleiki**
Vit leita eftir einum persóni, sum er røkin og nærlagdur, og trívist í einum arbeiðsumhvørvi við nógvari ferð.

Tað rætta starvsfólkið hevur:
- hóskandi útbúgving
- viðkomandi royndir
- evni at arbeiða skjótt og sjálvstøðugt
- evni at arbeiða við fleiri ymiskum uppgávum samstundis
- førleikar at arbeiða eftir lógarverki
- góð samstarvsevni
- evni at samskifta bæði í skrift og talu
- góðan teldukunnleika

Talan er um eitt fast fulltíðarstarv við góðum møguleikum fyri eftirútbúgving. Løn sambært avtalu. Starvið verður sett skjótast til ber.

### Málsviðgeri til Ávísingardeildina

**Um Ávísingardeildina**
Ávísingardeildin umsitur arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin og førleikagevandi tiltøk fyri arbeiðsleys.

Á Ávísingardeildini starvast 4 fólk.

**Uppgávur**
Uppgávurnar hjá málsviðgeranum verða:
- at hava samrøður við arbeiðsleys við atliti at førleikamenning
- at taka sær av arbeiðsávísing
- at samskifta og samstarva við arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar kring landið
- saman við starvsfeløgunum at tillaga og menna tænasturnar.

Starvið ber við sær ávísa ferðing í Føroyum.

**Førleiki**
Vit leita eftir einum persóni, sum er ágrýtin, opin og dámar væl at hitta nógv fólk.

Tað rætta starvsfólkið hevur:
- hóskandi útbúgving
- viðkomandi royndir
- góð innlivingarevni
- evni at hava samrøður við viðskiftafólk okkara
- evni at arbeiða sjálvstøðugt og við fleiri ymiskum uppgávum samstundis
- evni at samstarva
- evni at samskifta í skrift og talu
- kunnleika til arbeiðsmarknaðarviðurskifti
- góðan teldukunnleika

Talan er um eitt fast fulltíðarstarv við góðum møguleikum fyri eftirútbúgving. Løn sambært avtalu. Starvið verður sett skjótast til ber.

www.sansir.fo

### Umsóknir

Umsóknir, við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera ALS í hendi í seinasta lagi mikudagin 18. mai kl. 12.00.

Umsóknir skulu sendast til:
ALS, Postsmoga 3022, 110 Tórshavn
(merkt: umsókn)
ella til teldupost als@als.fo

Nærri fæst at vita um starvið á Ávísingardeildini við at venda sær til Kristionnu W. Poulsen og starvið á Tryggingardeildini við at venda sær til Jóhan E. Simonsen á tel. 349550 ella á teldupostadressu als@als.fo.

ALS

Arbeiðsloysisskipanin • Postsmoga 3022
FO-110 Tórshavn • Tel 349550 • Fax 349551
als@als.fo • www.als.fo